BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
110 Tórshavn

8. mai 2023
Mál: 22/22133-20

Svar

upp á

§ 52a fyrispurning nr. 52-083/2022 frá Beinir Johannesen, løgtingsmanni, settur Djóna Nolsøe Joensen, landsstýrismanni, um skúlaskeið hjá lærlingum.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. **Hvussu nógvir lærlingar fara í dag til Danmarkar, tá teir skulu undir skúlagongd?**
2. **Hvørja útbúgving eru hesir lærlingar í holt við?**
3. **Fyriliggur nøkur ætlan um, at fleiri av hesum skúlaskeiðum skulu kunna takast í Føroyum?**

Svar

Til 1: 36% av teimum knapt 6.000 lærlingunum, sum síðan 2005 eru farnir undir eina yrkisútbúgving, hava tikið eina útbúgving, har skúlagongdin er í Danmark.

Til 2: Í Føroyum ber til at taka umleið 70 yrkisútbúgvingar. Av teimum 70 ber til at taka skúlagongdina til 15 yrkisútbúgvingar í Føroyum, ímeðan restin krevur, at lærlingarnir fara til Danmarkar at taka tilhoyrandi skúlagongd.

Felags fyri allar yrkisútbúgvingarnar við danskari skúlagongd er, at talið av lærlingum, sum árliga fara undir eina av hesum útbúgvingum, er lágt og ógvuliga sjáldan yvir 5 lærlingar pr. útbúgving/ár. Tó við ávísum undantøkum.

Ein stórur partur av teimum lærlingum, sum fara til Danmarkar, eru í læru innan handil og sølu. Í hesum útbúgvingum ber til at velja ímillum eina ørgrynnu av sergreinum, alt eftir, um tú arbeiðir við nethandli, á einum lagri ella í einum handli, sum selur køkar, maskinur, blómur ella annað. Tí er vanligt, at lærlingar, sum læra í handli, velja at fara í ein skúla, ið bjóðar somu sergrein, sum lærlingurin er í læru innan, hóast tað ber til at taka eina generella søluútbúgving uttan sergrein í Føroyum.

Av teimum, sum í løtuni eru undir einari føroyskari yrkisútbúgving við danskari skúlagongd, eru knapt 25% í læru innan handil og sølu. Hini 75% av verandi lærlingum, sum eru í holt við eina yrkisútbúgving við danskari skúlagongd, eru í læru innan 42 ymiskar útbúgvingar. Í løtuni eru t.d. 10 í holt við elektronikfaktøkning, 7 við entreprenørmaskinmekanikara og 8 við KT supportara.

Ein yrkisútbúgving innan skrivstovuyrkið verður boðin út í Føroyum. Flestu lærlingarnir, sum eru í læru til eina yrkisútbúgving innan skrivstovu við danskari skúlagongd, eru í læru til eina sergrein innan skrivstovu, so sum læknaskrivara, advokatskrivara ella taka eina skrivstovuútbúgving við sergrein (t.d. Almenn fyrisiting, Speditión og shipping ella Grannskoðan).

Felags fyri merkantilu útbúgvingarnar (søla/handil og skrivstovu) er, at so gott sum allir hesir lærlingar hava aðra miðnámsútbúgving, áðrenn teir fara í læru. Longdin á skúlagongdini, sum hoyrir til útbúgvingina er tí í mesta lagi 15 vikur ígjøgnum lærutíðina á 2 ár, har lærlingarnir skulu til Danmarkar í skúla.

Talið av lærlingum er nær tengt at samfelagskonjunkturunum, og í góðum tíðum fara lærlingatølini til onkrar útbúgvingar nakað upp – tó ógvuliga sjáldan upp um 5 lærlingar um árið, ímeðan tølini í lágkonjunkturi gerast ógvuliga lág og í summum førum steðga upp.

Til ber at fáa heilt neyvar upplýsingar fyri hvørja av hesum útbúgvingunum inni á heimasíðuni hjá Yrkisdeplinum: www.yrkisdepilin.fo, við at fara undir Hagtøl.

Til 3: Yrkisútbúgvingarráðið, ið er mannað við umboðum frá arbeiðsmarknaðarpørtunum, mælir landsstýrismanninum til, hvørjar tillagingar vinnan heldur eiga at verða gjørdar á yrkisútbúgvingarøkinum. Tann nýggjastu broytingin er Kokkaútbúgvingin, sum júst er lýst í kunngerð. Tey seinnu skúlaskeiðini til kokk hava áður bert verið í donskum skúla, men kunnu nú takast í Føroyum. Annars kann nevnast alaraútbúgvingin, sum byrjaði í august 2022, og í næstum verður uppskot um at seta á stovn eina Kt-supportara útbúgving klárt at lata landsstýrismanninum.

Ráðsskipanin, sum eru Yrkisútbúgvingarráðið og Yrkisnevndin, heldur eitt vakið eyga við gongdini í lærusáttmálum og gevur javnan landsstýrismanninum tilmælir um tær broytingarnar, sum mett verður, at tørvur er á.

Yrkisútbúgvingarráðið og Yrkisdepilin arbeiða í løtuni við at fáa gjørt eitt yvirlit yvir tey skúlaskeið, sum føroysku skúlarnir kundu bjóða uttan stóran eyka kostnað, við at lærlingar kundu samlisið við aðrar útbúgvingar, har samanfall er í innihaldinum í fyrstu skúlaskeiðunum.

Yrkisútbúgvingarráðið er eisini farið undir at greina, hvørjar útbúgvingar serligur tørvur er á verða settar í verk, til tess at grøna orkuskiftið og rákið at skapa størri burðardygd, verður stuðlað við góðum og hóskandi yrkisútbúgvingum.

Vinarliga

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður